# Atli stríðist í felagi við trupulleikum

**Atli Danielsen er ein av stuðulsspælarunum í danska 1. deildarfelagnum Frem, sum í fleiri ár hevur havt fíggjarligar trupulleikar**




*Hóast Frem er í truplari fíggjarligari støðu, so hevur tað gingið væl hjá Atla Danielsen ítróttarliga*

Seinasta árið hevur klaksvíkingurin Alti Danielsen spælt fyri danska 1. Deildarfelagið Frem, sum hevur sín heimavøll í Valby í Keypmannahavn.

Tað hevur gingið væl hjá Atla í Frem, men felagið sjálvt hevur havt trupulleikar at stríðast við seinnu árini. Eftir uppflytingina til superliguna fyri nøkrum árum síðani satsaði felagið stórt, men tað miseydnaðist, og felagið flutti niður aftur – við stórari skuld.

Júst í hesum døgum roynir felagið at minka um sína skuld við eini tvangsakkord, sum skiftirætturin skal góðtaka. Felagið roknar við, at akkordskipanin fer at bjarga felagnum burtur úr fíggjarliga óførinum, sum hóttir felagið.

**Varðveita plássið**

Á vøllinum snýr uppgávan í summar seg um at varðveita plássið í 1. deild. Orsaka av fíggjarligu trupulleikunum hevur Frem ikki kunna gjørt sáttmálar við nýggjar spælarar, og tá ið onkrir spælarar eru farnir burtur av, hevur liðið ikki tað styrkina, sum tað kundi ynskt sær.

Millum annað hevur felagið havt trupulleikar á málmansplássinum, síðani Jørgen Nielsen valdi at gevast, men garvaði málmaðurin hevur nú játtað at hjálpa felagnum restina av hesum kappingarárinum.

Fleiri av teimum spælarunum, sum hava mannað liðið seinasta árið, eru framvegis tøkir, og ein teirra er Atli Danielsen, sum hevur átt fast pláss á miðvøllinum hjá Frem. Tí eru vónirnar hampuligar um, at Frem fer at varðveita sætið í 1. deild, samstundis sum arbeitt verður við at rysta fíggjarliga trupuleikarnar av sær.

---


*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*


# Spælitíð fram um pengar

**Jónas Tór Næss og Johan V. Gunnarsson vilja heldur sleppa á vøllin, enn at fáa nakrar krónur í kassan**

Báðir eru teir føddir í 1986. Annar er høgri bakkur og hin vinstri bakkur. Báðir spældu teir í Formuladeildini og á U21-landsliðnum, men nú royna teir eydnuna í Køge sum liggur í næstbestu donsku deildini. Talan er um Jónas Þór Næss og Johan V. Gunnarsson.

Teir eru tveir av fleiri føroyingum, sum royna seg í donskum fótbólti, men tað sum skilir teir frá hinum føroysku fótbóltsútisetunum er, at teir spæla uttan at fáa pengar afturfyri.

– Hjá mær er tað soleiðis, at spælitíð vigar hægri enn pengar beint nú, sigur Jónas Þór Næss, sum ikki afturvísir, at hann nokk hevði kunnað fingið ein sáttmála við eitt felag, har møguleikarnir fyri spælitíð ikki høvdu verið eins góðir. Men Køge vísti stóran áhuga fyri teimum báðum føroyingunum, sum vóru vælmóttiknir í hugnaliga felagnum. Tískil gjørdu teir av at skriva undir áhugasáttmála við felagið, har útlit eru fyri spælitíð á høgum støði.

Venjari hjá Køge er fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin Henrik Larsen. Hetta metir Jónas vera ein fyrimun hjá honum og Johan.

– Hann er ein fantastiskur venjari. Menniskjasligur og dugir væl at tosa við leikararnar. So kom tað eisini væl við, at hann visti hvørjir vit vóru, tá vit komu til felagið. Tað einasta keðiliga er, at Henrik skilir nakað av føroyskum, so eg og Johan mugu ansa eftir hvat vit siga við hvønn annan, flennir Jónas.

Nú er avmarkað hvat Jónas og Johan hava sagt við hvønn annan, tí Johan hevur verið skaddur síðani januarmánað. Tískil hevur hann verið nógv heima í Føroyum.

– Men nú gongur betur hjá mær, og eri byrjaður so smátt at venja aftur, sigur Johan V. Gunnarsson, sum trívist væl í Køge saman við Jónas.

---


*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*


## Gullið er ein møguleiki

**Jón Rói Jacobsen hevur møguleika at verða triði føroyingurin, sum vinnur DM-gull í fótbólti**

Jákup Mikkelsen gjørdi tað í Herfølge, og Todi Jónsson hevur fleiri ferðir gjørt tað í FCK.

Í summar fæst at vita, um Jón Rói Jacobsen verður triði føroyingurin, sum vinnur danskt gull í fótbólti.

Hóast hann ikki so ofta hevur verið millum teir fyrstu 11 á vøllinum, so hevur føroyski verjuspælarin støðugt verið partur av hópinum hjá AaB hetta kappingarárið.

Í heyst var felagið støðugt partur av oddastríðnum í dysti við FCK, og enn er so einki sum helst avgjørt teirra millum. Og við verandi støðuni í huga er væl hugsandi, at talan verður um satt DM-brak, tá AaB tann 12. mai kemur á vitjan í Parkini.

Og tó at Jón Rói enn ikki verður roknaður millum føstu nøvnini á vøllinu, so er lítil ivi um, at føroyski verjuspælarin eisini fær sítt at síggja til í vár. Í eini kapprenning, har DM-gullið stendur upp á spæl, er ofta brúk fyri einum sterkum og breiðum hópi, og so er at taka kjansin, tá hesin býðst.

---


*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Hóast plássið í hópinum langt ífrá er fast, er Jón Rói partur av liðnum, sum stríðist við FCK um DM-gullið*